FYLGISKJAL 8

LM-037/2025

Almannamálaráðið
Eirargarður 2
FO-100 Tórshavn

Staður: Tórshavn
Dagfesting: 03.10.2025
Ummælistíð: 12.09.2025-03.10.2025
J. nr. (MEGD): 701-7-2025
J. nr. (AMMR):

Hoyringarskriv
til uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m.
(Ábyrgdin av dagtilboðum og umlætting til fólk við demens undir fólkapensjónsaldur verður flutt til kommunurnar)

MEGD takkar fyri møguleikan at senda hoyringarskriv um nevnda uppskot til løgtingslóg og fyri ein góðan og áhugaverdan kunnandi fund millum limafeløgini og embætisfólk úr Almannamálaráðnum og Almannaverkinum.

1. MEGD fegnast um at Almanna- og mentamálaráðið hevur tikið áheitanir í álvara frá m.a. Alzheimerfelagnum, um at savna tænastur til fólk við demens undir fólkapensjónsaldur, sum higartil mangan eru dottin niður ímillum skipanir, sum ikki eru samskipaðar millum land og kommunur. MEGD mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

2. Tá hetta uppskotið vónandi er samtykt í Løgtinginum, hevði tað verið ynskiligt at gongd verður sett á eitt arbeiði at orða ein demenspolitikk fyri Føroyar, sum millum annað hevur til endamáls at seta í verk og samskipa ítøkilig langtíðar átøk, sum kunnu vera við til at fyribyrgja at føroyingar verða raktir av demens. Demenspolitikkurin eigur at verða granskingargrundaður, soleiðis at viðkomandi átøk veruliga gera mun. sí millum annað frágreiðing frá Nordisk Velfærdscenter, *Preventing dementia in the Nordics: Evidence-based measures across the life course.* [1]

---

[1] Sí nýggja frágreiðing frá norðurlendska vælferðardeplinum (Nordisk Velfærdscenter): *Preventing dementia in the Nordics: Evidence-based measures across the life course*. Kelda: www.norden.org/en/publication/preventing-dementia-nordics.
Sí eisini t.d. nýggja gransking um fyribyging í mun til demens: *Dementia prevention, intervention, and care: 2024 report of the Lancet standing Commission.* Livingston, Gill et al. The Lancet, Volume 404, Issue 10452, 572 – 628.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

3. MEGD hevur fingið kunning frá limafeløgunum um, at fólk við breki ella varandi sjúku, sum eru undir fólkapensjónsaldur, eru í øktum váða fyri at fáa demens tíðliga í lívinum, og at hetta ávirkar lívsgóðsku, livialdur, rættindi o.s.fr., bæði hjá teimum sjálvum og hjá avvarðandi teirra.

   Hetta er millum annað galdandi fyri fólk, ið hava menningartarn,[2] ella har brekið kann ávirka heilan, her undir epilepsi, autismu, ADHD, sinnistarn, sclerosu og parkinson. Fólk við øðrum sløgum at breki ella varandi sjúku eru eisini í øktum váða fyri at fáa demens, her undir fólk við rørslutarni og hjarta- og karsjúku. Nevndu samfelagsbólkar tykjast tíverri ikki at fáa nøktandi ágóða av viðkomandi vælferðartænastum, bæði *áðrenn* sjúkugreiningina, men eisini rættstundis tilboð, hjálpartól o.l. beint *eftir* at demenssjúka er staðfest.

   MEGD hevur ígjøgnum fleiri ár eisini fingið kunning frá limafeløgunum um, at limir teirra alt ov mangan vegna brek ella varandi sjúku, sum heild, ikki kunnu luttaka á jøvnum føti við onnur, í fyribyrgjandi átøkum, eitt nú innan fólkaheilsu.

   Á hesum grundarlagi er eisini ynskiligt, at tá hetta uppskotið vónandi er endaliga samtykt í løgtinginum, at ein nýggjur demenspolitikkur verður orðaður soleiðis fyribyrgjandi átøk og vælferðartænastur verða hóskandi tillagað til at eisini fevna fólki við breki og varandi sjúku, her fólk við menningartarni, rørslutarni, sálarligum og sansaligum tarni.

4. MEGD mælir til at ein eftirmeting verður skipað innan rímiliga tíð, har ein kanning verður gjørd um hvussu tað gongur við dagtilboðum og umlætting til fólk við demens undir fólkapensjónsaldur, tá kommunurnar hava havt hesa týðandi ábyrgd í nøkur ár. Hendan eftirmeting kundi eisini fevnt um aðrar vælferðartænastur, bæði hjá landi og kommunum.

Vinaliga vegna MEGD,

Ása Olsen
forkvinna

Bárður Atlason Ísheim
aðalskrivari

[2] Sí eitt nú https://content.ugeskriftet.dk/sites/default/files/scientific_article_files/2014-06/artikel_11232.pdf

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo